Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Til:
Uttanríkis- og Vinnumálaráðið
Tinganes
Postrúm 377
110 Tórshavn
Sent við telduposti til: uvmr@uvmr.fo

2023.02.21 - UVMR hoyring hvítvasklóggáva
Tórshavn, hin 21. februar 2023

Viðvíkjandi uppskoti um broyting í løgtingslógini um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (hvítvasklógin)

FFG hevur tann 6. februar 2023 fingið sendandi uppskot til broytingar í hvítvasklóggávuni fyri Føroyar til hoyringar, hetta bæði viðvíkjandi hvítvasklóggávuni fyri yvirtikin málsøkir, *"uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyribyrgjandi tiltøk ímóti hvítvaski av vinningi og fígging av yvirgangi (Hvítvasklógin)"* og hvítvasklóggávuni fyri felags málsøkir *"anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven) og lov om finansiel virksomhed"*. Uppskotini eru í hesum hoyringssvari viðgjørd undir einum.

Innleiðandi vil FFG takka fyri møguleikan at gera viðmerkingar til ætlaðu lógarbroytingarnar. Yvirskipað er endamálið at seta í verk skipanarlig tiltøk, sum styrkja verandi karmar um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi. Hesum endamálið tekur FFG fult undir við.

Talan er um rúgvismikið tilfar sum er sent til hoyringar, sum krevur serligt innlit fyri yvirhøvur at kunna viðgera á ein effektivan hátt. Nevndin í FFG hevur tí saman við Eli Thorsteinsson advokati, serkønum innan fíggjarliga lóggávu, undir hesum bankalóggávu, hvítvasklóggávu vm., gjøgnumgingið og viðgjørt ætlaðu broytingarnar og hevur í tí sambandi hesar fáu viðmerkingar niðanfyri.

Viðmerkingarnar eru royndar hildnar innanfyri tað sum vit meta kann vera serliga viðkomandi fyri grannskoðaravinnuna, við tað at vit hava álit á at uppskotini eisini eru send øðrum viðkomandi pørtum til ummælis, undir hesum eitt nú umboðum fyri listahandlarum, sum við ætlaðu broytingunum eisini vera fevndir av Hvítvasklógini framyvir.

Viðmerking til § 1, nr. 17 (Hvítvasklógin) og § 1, nr. 22 (Hvidvaskloven) – krav um fráboðan
Í uppskotunum báðum verður m.a. lagt upp til í nýggjum ásetingum, at um ein fyritøka ella persónur fevndur av lógini og reglunum um kundakunnleikamannagongdir (undir hesum grannskoðarar) fær kunnleika til, at upplýsingarnar um veruligu eigararnar hjá kundanum, sum eru fingnar til vega í sambandi við fremjan av kundakunnleikamannagongd, ikki eru í samsvari við upplýsingarnar um veruligu eigararnar hjá kundanum, ið eru skrásettar í kt-skipan hjá Skráseting Føroya, skal ósamsvarið og skjalprógv fyri hesum fráboðast Skráseting Føroya skjótast til ber.

FFG tekur undir við endamálinum við hesum ásetingum, sum er at styðja uppundir, at eigaraskráin inniheldur rættar upplýsingar. FFG er tó av tí fatan, at ásetingin eigur at verða orðað øðrvísi.

Uppskotini til nýggjar ásetingar § 14a, stk. 1 í Hvítvasklógini og § 15a, stk. 1 í Hvidvaskloven, eru óskynsamt orðaðar soleiðis sum nú er og kann tað fara at virka órímuliga tungtog endamálsleyst at

samtykkja ásetingarnar soleiðis sum tær nú eru orðaðar. Ásetingarnar eiga tí at broytast áðrenn uppskotini bæði vera samtykt av Løgtinginum.

FFG vil í hesum føri nevna, at talan kann vera um ymiskar flokkar av ósamsvari sum kunnu koma fyri:

1. Óætlað manglandi skráseting
2. Óætlað skeiv skráseting
3. Tilætlað manglandi skráseting ella tilætlað skeiv skráseting.

Um so er at ein grannskoðari staðfestur ósamsvar í flokki 1 og 2 omanfyri, og tað vera gjørdar tær neyðugu rættingarnar av skrásetingunum í eigaraskránni innanfyri eina stutta freist, so vil talan vera um eina óneyðugaog endamálsleysa byrðu at leggja á bæði grannskoðara, kundafyritøku og Skráseting Føroya um krav um eina fráboðan frá grannskoðara til Skráseting Føroya verður fasthildið í tílíkum føri.

Endamálið við ásetingini er at styðja uppundir, at eigaraskráin inniheldur rættar upplýsingar. Hetta er tryggjað við at leiðslan í kundafyritøkuni í døminum omanfyri rættar skrásetingina, soleiðis at onki ósamsvar fyriliggur sum krevur fráboðan frá grannskoðara.

Uppskotini til nýggjar ásetingar § 14a, stk. 1 og § 15a, stk. 1 í ávikavist Hvítvasklógini og Hvidvaskloven, eiga tí at skrivast heilt av nýggjum. Samstundis eigur tað at nágreinast nær fráboðanarskyldan er galdandi.

Í uppskotinum til nýggja áseting § 14a, stk. 3 í Hvítvasklógini verður skotið upp, at landsstýrismaðurin kann áseta nærri reglur um, hvussu tann tekniski parturin av fráboðanarskylduni verður lokin. Í viðmerkingunum til ásetingina verður á s. 55 eisini nevnt, at loysnin viðvíkjandi fráboðanarskylduni verður skipað í samsvari við grein 61, stk. 2, í 4. hvítvaskdirektivinum. Víst verður eisini til serligu viðmerkingarnar í § 1, nr. 21 í 2018/1 LSF 204, fylgiskjali 2, sum er lagt við í tilfarinum sent til hoyringar.

Í nevnda fylgiskjali 2 stendur fylgandi á s. 73:

> *"Indberetningsløsningen vil blive indrettet i overensstemmelse med artikel 61, stk. 2, i 4. hvidvaskdirektiv, der fastsætter krav til de mekanismer, der skal fremme indberetningen af uoverensstemmelser. Det omfatter blandt andet passende beskyttelse af indberetter og af den virksomhed, fond eller forening, som indberetningen vedrører. Den virksomhed, fond eller forening, som indberetningen vedrører, vil derfor ikke få oplyst, hvem der har foretaget indberetningen."*

Hóast hetta so stendur onki um talan er um tagnarskyldu ella ikki hjá t.d. einum grannskoðara yvirfyri eini kundafyritøku, sum grannskoðarin hevur sent fráboðan inn um til Skráseting Føroya. Tvs. tað tykist óvist um talan er um nakra tagnarskyldu hjá tí sum hevur fráboðanarskyldu, ella um kundin møguliga hevur rætt til at fáa innlit hjá tí sum hevur fráboðanarskyldu um tílík fráboðan er send inn um viðkomandi. Rættarstøðan hesum viðvíkjandi eigur at verða nágreinað í einari nýggjari orðing av ásetingini.

Í hesum sambandi heldur FFG, at tað samstundis kundi verði áhugavert at fari undir at endurhugsa alt økið við eigarabókum í vinnufeløgum av nýggjum, undir hesum um tað møguliga kundi verið ein skilabetri loysn at t.d. latið eigaraskránna hjá Skráseting Føroya fingið status sum eitt slag av almennari eigaraheimildarskrá, hetta líknandi tinglýsingarskipanini viðvíkjandi fastari ogn. Til tess hevði eisini verið neyðugt at endurhugsa partar av vinnufelagslógini. FFG luttekur gjarna í einari møguligari viðgerð, kjaki osv. av hesum saman við viðkomandi myndugleikum.

Onnur viðurskifti
Nevndin í FFG tekur annars í útgangsstøðinum undir við ætlaðu broytingunum í síni heild, undir hesum endamálinum sum er at seta í verk skipanarlig tiltøk, sum styrkja verandi karmar um fyribyrging av hvítvaski og fígging av yvirgangi. FFG vil tó taka tað fyrivarni, at har kunnu vera avleiðingar sum FFG við hesari hoyring ikki hevur fingið eyga á, hetta nú tá talan er um heldur stutta hoyringsfreist og rúgvismikið tilfar at fara ígjøgnum.

Kontantir
Eitt sum tó kann undra er, at kontantgjaldsbannið í § 5 í verandi Hvítvasklóg verður standandi óbroytt á kr. 50.000, hetta tá upphæddin í t.d. Danmark liggur á kr. 20.000. Talan tykist vera um eitt aktivt val um ikki at fylgja støðinum og gongdini í Danmark júst hesum viðkomandi, hóast nærmast øll onnur lóggáva á økinum tykist avritað úr danskari lóggávu. Áhugavert hevði verið at hoyrt sjónarmiðini fyri hesum vali.

FFG heldur at tað hevði verið vert at umhugsa eina broyting av upphæddini í kontantgjaldsbanninum. Hetta m.a. eisini við støði í nýggjastu váðametingini frá SØIK, sum kom út í januar 2023, har tað um Føroyar m.a. stendur fylgjandi á s. 253:

> *"En stor del af de modtagne underretninger, som omhandler færinger, indeholder et element af kontantøkonomi. Der er typisk tale om kontantindsættelser, som kunden enten ikke kan dokumentere, eller hvor den underretningspligtige finder forklaringen mistænkelig. Kontantindsættelser ses ofte i sammenhæng med udenlandstransaktioner, hvor de indsatte kontanter hurtigt videreformidles til eksempelvis konti i danske pengeinstitutter. Særligt kontantbaserede brancher som pizzeriaer og restauranter er nævnt i de underretninger, som omhandler mistænkelige kontantindsættelser."*

Ein lægri upphædd í kontantgjaldsbanninum hevði, alt annað líka, viðvirka til at hvítvaskváðin í Føroyum gjørdist lægri. Hinvegin kunnu tað vera onnur atlit sum tala fyri at lata kontantgjaldsbannið á kr. 50.000 skal standa óbroytt í føroyskari lóggávu, t.d. munurin á smidligum gjaldsloysnum í Danmark og Føroyum, undir hesum m.a. MobilePay og líknandi gjaldsloysnum sum ikki eru virknar í Føroyum.

Harumframt hava vit lagt til merkis, at Hvítvasklógin galdandi í Danmark, hevur eina áseting í § 5a, sum er soljóðandi:

> *"Betalinger foretaget med anonyme forudbetalte kort udstedt i tredjelande må ikke indløses i Danmark. Tilsvarende må restværdien i kontanter eller kontanthævning af pengeværdien på sådanne betalingskort ikke indløses i Danmark."*

Hendan ásetingin er so vítt við duga at síggja, ikki tikin við í tí føroysku hvítvasklóggávuna, heldur ikki við hesum tveimum uppskotunum sum nú eru til hoyringar. Ilt er at meta um tørvin á tílíkari áseting í føroyskari hvítvasklóggávu, men tað hevði verið vert at umhugsa at innført líknandi áseting her hjá okkum eisini.

Politiskt ábærir persónar
Viðvíkjandi uppskotinum um at strika ásetingina í § 17, stk. 7 í hvítvasklógini og í staðin áseta, at listin, sum Fíggjareftirlitið hevur gjørt um politiskt ábærar persónar í Føroyum, verður nýttur, skulu vit gera vart við, at hesin listin hjá Fíggjareftirlitinum er mangulfullur sum nú er. Hesin listin átti at vera tøkur hjá føroyskum fyritøkum at nýtt fyri umleið 4 árum síðani, men er tað framvegis ikki. Hetta verður eisini viðmerkt í nýggjastu váðametingini hjá SØIK, sum kom út í januar 2023, har tað um Føroyar m.a. stendur fylgjandi á s. 258:

> *"Et gennemgående tema i de interviews, Hvidvasksekretariatet har foretaget med de færøske underretningspligtige, er en mangelfuld liste over politisk eksponerede personer (PEP) på Færøerne. Flere af de interviewede underretningspligtige tilkendegav, at det er vanskeligt at risikovurdere og monitere transaktioner for færøske politisk eksponerede personer, familiemedlemmer og nære samarbejdspartneres samt deres økonomiske forhold uden en komplet liste over alle politisk eksponerede personer.*
>
> *I stedet syntes det at være en generel opfattelse blandt de underretningspligtige, at det var offentligt kendt, hvem der kunne betegnes som PEP, og der er således uofficielle lister blandt forskellige underretningspligtige.*
>
> *Finanstilsynet har på deres hjemmeside offentliggjort en PEP-liste, som har været tilgængelig siden 6. april 2022. Det er dog Hvidvasksekretariatets vurdering, at denne liste er mangelfuld i forhold til at omfavne hele Færøerne. Hvidvasksekretariatet bemærker, at ikke alle underretningspligtige var oplyste om, at listen over politisk eksponerede personer på Færøerne var tilgængelig via Finanstilsynet i Danmark."*

Í sambandi við tílíka broyting í § 17, stk. 7 í Hvítvasklógini er tí neyðugt onkursvegna at tryggja, at listin verður gjørdur og at listin áhaldandi verður dagførdur, tí tað er ikki støðan í dag. Tá lógarskyldur vera álagdar fyritøkum viðvíkjandi politiskt ábærum persónum, so er eisini umráðandi at myndugleikin hevur síni viðurskifti uppá pláss hesum viðvíkjandi. Tað er tíverri ikki støðan í dag.

Nærstandandi til politiskt ábærar persónar

Tá Hvítvasklógin seinast var til hoyringar afturí í januar 2020 skrivaðu vit um politiskt ábærar persónar, teirra nærstandandi og teirra tættu samstarvsfelagar, undir hesum at hesin persónbólkur allarhelst fór at blíva lutfalsliga nógv størri í Føroyum enn í øðrum londum. Hendan metingin er nokk ikki heilt av leið.

Vit halda tí at tað hevði verið vert at umhugsa, um tað t.d. bar til at víkja eitt vet frá allýsingini av "family members", sum "nærstandandi" verður nevnt í sjálvum ES direktivinum.

Hugsanin við hesum er, at allýsingin av "nærstandandi" kundi verið eitt sindur smalari í Føroyum, soleiðis at allýsingini t.d. einans fevndi um t.d. hjúnafelaga hjá persóni, sum er politiskt ábærur, skrásettur maki ella samlivi, men ikki um børn og teirra hjúnafelagar, skrásettu makar og samlivar. Hetta eisini tí spurnatekin kann setast við, hvussu neyðugt tað er her í Føroyum, at allur hesin persónbólkurin kemur undir hert eftirlit av bankum, grannskoðarum, advokatum og øðrum, og um hesin persónbólkur veruliga hevur nakran øktan váða við sær her hjá okkum.

Eru spurningar ella ivamál, eru tit sjálvandi altíð vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

Við heilsan

Felagið Føroyskir Grannskoðarar

Jóhannes Færø formaður	Olaf Frits Joensen næstformaður	Fróði Sivertsen peningarøkil	Alvi Nielsen skrivari